


# Avgerandi boring á Lancaster leiðini við markið

Jan Müller

28.04.2014 - 17:20

Oljan.fo

Hóast seinastu hagtølini frá bretskum oljumyndugleikum vísa, at tað verða boraðir alt færri brunnar á bretska landgrunninum, so stendur kortini ikki í stað vestan fyri Hetland. Her verða framhaldandi brunnar boraðir við tí endamáli at finna nýggjar olju- og gassgoymslur í undirgrundini umframt at gjørt verður klárt til at byggja út nýggjar keldur.

Nú um dagarnar varð so sett á at bora ein avmarkingar- og metingarbrunn ikki so langt frá føroyska markinum. Talan er um Lancaster leitimiðið, ið oljufelagið Harricane Energy hevur í umbúnað at byggja út. Felagið setti á leitimiðið 26. apríl við boripallinum Transocean Sedco 712.

Ætlanin er eisini at testa fundið á leiðini fyri at vita, um tað ber eina útbygging. Boritíðin er mett til 75 dagar. Eftir tað verða gjørdar tøkniligar kanningar.

Lancaster fundið varð gjørt í 2009. Og verður tað mett at goyma 207 mill. tunnur av olju.

*Kelda: Hurricane Energy / energy-pedia*